BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum fyrstilærari í Hvalvíkar skúla

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum**

Starvið sum fyrstilærari í Hvalvíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. desembur 2023. Í Hvalvíkar skúla ganga næmingar í innskúlingini, 1. – 3. flokki, og í hesum skúlári hevur skúlin 20 næmingar, sum ganga í 2. og 3. flokki. Í skúlanum starvast 2 lærarar umframt fyrstalæraran.

**Um starvið**

Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini.

**Førleikakrøv**

- Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.
- Leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving innan leiðslu eru ein fyrimunur
- Skulu duga at orða seg á góðum føroyskum máli
- Hava áhuga fyri avbjóðingum og førleika at taka neyðugar avgerðir

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Hvalvíkar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal vera Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi 13. novembur 2023.

**Umsóknin verður stílað til:**

Barna- og útbúgvingarmálráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: **bumr@bumr.fo**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Høgna Warberg, fulltrúa, tlf. 555054.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. Sí heimasíðu ráðsins [www.bumr.fo](www.bumr.fo)*